
Mynd av Sofusi tikin hjá myndamanni í Keypmannahavn í 1940

týdningarmikið og tíðarkrevjandi arbeiði, men eisini sera vandamikið. Í desember 1943 varð ein av starvsfeløgunum hjá Sofusi tikin. Hann nevndi nøkur nøvn. Millum annað navnið á Sofusi. Sofus hevði júst verið til skrivliga próvtøku, men varð noyddur undir jørðina, áðrenn hann slapp upp til munnliga próvtøku. Hann sigur frá, at hann var sera keddur av hesum, tí hann hevði fyrireikað seg til próvtøkuna og vildi ikki, at hetta arbeiðið skuldi fara til spillis. Tí valdi hann, at møta upp til munnligu próvtøkuna, væl vitandi um, at nasistarnir kundu taka hann, ein vinmaður var longu endaður í týningarlegu. Hann var gjøgnumbloyttur í sveitta, áðrenn próvtøkan var av. Men tað gekk væl, og hann slapp undir jørðina aftur uttan at verða tikin.

Hetta var í januar 1944, og Sofus fekk tí ikki gjørt meira við skúlan, fyrr enn kríggið var av.Í staðin nýtti hann alla sína tíð til arbeiðið við ólógligum bløðum

## Heim til Føroyar

Aftan á kríggi brúkti Sofus fyrstu tíðina, til at halda frí, áðrenn hann byrjaði aftur at lesa. Í 1949 var hann liðugur sum cand. polit. Hann skuldi nú velja sína lívsleið. Hann hugsaði eitt sindur um, at fara í starv í ministeriuminum í Danmark. Men Jóhann Djurhuus vildi hava hann at koma heim í eitt starv í Vinnulánsgrunninum. Sofus søkti starvið, men fekk tað ikki. Hann sigur orsøkina vera hansara politiska tilknýti, ið ikki var tað sama, sum tað hjá tí, ið skuldi seta starvið.

## Stillaði upp fyri Tjóðveldisflokkin

Hann byrjaði í staðin hjá sakføraranum Leif Waagstein. Skrivstovan hevði nógv arbeiði innan vinnulívið, og Sofus var settur at arbeiða við hesum. Her treivst hann ikki serliga væl. So tá Erlendur Patursson í 1950 bað Sofus um at stilla upp fyri Tjóðveldisflokkin á fyrsta løgtingsvalinum, ið flokkurin stillaði upp til, var hann til dystin fús. Hann var sostatt við til at tryggja flokkinum, neyðugu atkvøðurnar til at fáa tvey umboð á ting. Um sama mundið fór hann í starv sum skrivari hjá Havnar Arbeiðsmannafelag. Hann røkti hetta starv til í 1954, tá han fór av landinum aftur.

## Góðir dagar í Skotlandi

Sofus leitaði sær til Glasgow í Skotlandi. Hann kallar Glasgow eitt magiskt stað, og hann hevur miklan alsk til Skotland enn í dag. Í Glasgow starvaðist hann í tvey ár hjá Scottish Cooperative Wholesale Society. Hann minnist hetta sum sínar bestu dagar. Hann vildi fegin halda fram í starvinum, og tey vildu eisini fegin hava, at hann varð verandi, men hann fekk ikki arbeiðsloyvið. Tí noyddist hann heim aftur. Nógv fremmandafólk kom til Bretlands í árunum eftir kríggið, so trupult var at fáa arbeiðsloyvið. Tað gjørdi heldur ikki støðuna betur, at Scottish Cooperative Wholesale Society stuðlaði Labour, og teir konservativu sótu í stjórn. Sofus hevur vitjað aftur í Skotlandi javnan. Hann leggur ikki skjól á, at hetta er eitt land, ið eigur eitt serligt pláss í hansara hjarta.

## Sigldi við fiski

Heimaftur komin til Føroyar arbeiddi Sofus eitt sindur fyri D.P. Danielsen, og fekst við leyst og fast. Hann fór í 1957 til Aberdeen at royna eydnuna. Men treivst ongantíð veruliga har, so tá nakrir mánaðar vóru farnir,fór hann aftur til Føroyar at arbeiða fyri Samvinnufelagið og Fiskimannafelagið. Hann varð settur sum troubleshooter og fekst við fiskin frá útróðrinum í Grønlandi. Hann sigldi við farmaskipum niður til evropeiska marknaðin við fiskinum og hevði ábyrgd av at ansa eftir fiskinum, takað sær av trupulleikunum, um okkurt var áfatt við góðskuni og syrgja fyri, at eingin snýtti føroyska seljaran. Her var talan um túrar m.a. til støð sum Grikkaland, Napoli og Rom.

## Reiðari í 40 ár

Í 1961 gjørdist hann reiðari á Havsøka. Hann segði hetta starv frá sær í 1967 og gjørdist í staðin reiðari á Polli. Her byrjaði samstarvið við Demmus Hentze, ið átti skipið og var skipari á tí. Hetta samstarv helt í 32 ár, og hóast Pollur varð skiftur út við Hoyvíking, so hildu Sofus og Demmus fram við somu leiklutum. Sofus sigur, at Demmus gav honum fríar teymar. Hetta trivust teir báðir væl við. Hetta er kanska heldur ikki so løgið. Tí tey 40 árini Sofus fekst við reiðaravirksemið hevði hann ikki reyð tøl á einum einasta roknskapi. Hetta hóast tíðirnar og fiskiskapurin hava verið skiftandi.

## Yrkið í fíggjarheiminum

Í 1963 varð Búskaparráðið sett á stovn, Sofus var við frá byrjan. Hann røkti henda álitissess fram til 1992. Í tíðarskeiðinum 1980-92 sat hann sum formaður í ráðnum.

Í árunum 1964-70 virkaði Sofus sum fiskaútflytari. Hann seldi fisk fyri nøkur skip, ið ikki vóru undir Fiskasøluni, hetta var eftir áheitan frá Løgmanni Hákuni Djurhus, ið bað hesi fiskiskip um at selja fiskin í felag. Hetta starv gavst Sofus við í 1970, tá táverandi stjórin í Føroya Banka bað hann um at koma í starv sum grannskoðari hjá bankanum. Hetta starv røkti Sofus fram til 1986, tá hann fór frá. Miðskeiðis í 80'árunum, royndi Sofus sum grannskoðari hjá bankanum at senda boð til Den Danske Bank, um at sum gongdin var, fór at verða galin endi. Men Revisiónschefurin vildi ikki bera boðini víðari, greiður Sofus frá.

## Áhugin fyri listini

Í 1961 keypti Sofus sín fyrsta málning, og hevur líka síðan hetta samlað list, serliga útvalda føroyska list. Áhugin fyri myndlistini kom síðst í fimti árunum. Hesa tíðina gekk hann inn í hús, har nógvir málningar hingu, og hesir vaktu hansara ans. Um sama mundið gjørdist hann vinmaður við Nonnegaard, ið var stjóri í Føroya Banka. Nonnegaard hevði stóran áhuga í myndlist og hetta smittaði. Saman við Hanus við Høgadalsá, settu Sofus og Nonnegaard eina ávísa upphædd um mánaðin av til at keypa listaverk hjá útvaldum listamonnum, m.ø. Ingálvi av Ryeni. Teir deildu síðan listaverkini í millum sín.

Áhugan fyri myndlist hevði Sofus felags við konu sína Gunnhild, ið hann giftist við í 1965. Gunnhild hevði sjálv málað sum yngri, og í húsunum á Tinghúsvegnum vóru longu, tá Sofus flutti inn listaverk av málarum sum Waagstein og Mikines. Tey høvdu sostatt bæði nógva gleði av listini, ið tey samlaðu sær gjøgnum árini heilt upp til 1999, tá Gunhild andaðist.

## Høg góðskukrøv

Sofus hevur eisini stóran áhuga í aðrari list, bæði tónlist og bókmentum. Hann er kendur fyri sínar onkuntíð heldur bersøgnu meiningar og setur høg góðskukrøv. Hetta hevur verið við til, at gera savnið hjá Sofusi, til ivaleyst tað mest forkunnuga og spennandi privata listasavnið í Føroyum.

Hetta er list, sum hann hevur savnað ígjøgnum eitt langt lív sum listasavnari. Við útvaldum listaverkum av m.ø. Samuel Joensen Mikines, Poul Horsdal, Elinborg Lützen, Jack Kampmann og Frimod Joensen umframt nógv listaverk av Ingálvi av Reyni.


Sofus á veg til Capri har hann var 3 dagar á ferðum sínum í 1959


Mynd tikin í 80-unum av Sofusi og konuni Gunnhild í heiminum á Tinghúsvegnum